## Snýttir í løn

Ein kanning í Noregi vísir, at triði hvør póllendingur, sum er komin til Noregs at arbeiða, fær ikki ta løn, sum hann ella hon av røttum eigur at fáa. Í 14 prosentum av førunum vísti tað seg, at arbeiðsgevararnir brúktu falskar sáttmálar, og sjey prosent av teimum spurdu póllendingunum høvdu upplivað, at arbeiðsgevarin var farin á húsagang, og at teir sótu eftir á berum. Langir arbeiðsdagar og vánalig íbúðarviðurskifti eru eisini vanlig.

## Rýma undan flyting

Fleiri týðandi starvsfólk í olju- og gassdeildini hjá Norsk Hydro hava so ilt við at góðtaka avgerðina at leggja deildina saman við Statoil, at tey velja at fara í annað starv heldur enn at halda fram í nýggja felagnum. Oljuprofessarin Øystein Noreng sigur við Dagens Næringsliv, at starvsfólkini í Norsk Hydro vænta at verða sett til viks í nýggja felagnum, og tí rýma tey. Fleiri teirra vilja heldur hava annað starv í tí, sum verður eftir av gamla felagnum.

# Trý skip fáa aksiltrekk á Tórshavnar Skipasmiðju



*Í løtuni standa fýra skip á bedingini hjá Tórshavnar Skipasmiðju. Trý teirra skulu hava aksiltrekk*

*9Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Tað hevur ikki verið so nógv at gjørt á bedingini í seinastuni, og vit hava heldur ikki so nógv fólk at taka av í løtuni, nú nógvir maskinsmiðir arbeiða upp á nýbygningin í byggihøllini, sigur bedingsmeistarin, Kristoffur Lützen**

ÍDNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í løtuni standa trý skip á bedingini hjá Tórshavnar Skipasmiðju, sum skulu hava aksiltrekk. Skipini eru línubáturin Helena, garnaskipið Thor og trolbáturin Búgvin.

Bedingsmeistarin, Kristoffur Lützen, sigur, at slík arbeiðir vanliga ikki taka so langa tíð.

- Aksiltrekk tekur vanliga ikki langa tíð. Hetta eru skip, sum koma upp og fara síðan av aftur.

Á bedingini stendur eisini ein annar bátur í løtuni.

- Hetta er fóðurbáturin Nordic, sum vanliga liggur fyri teym á Funningsfirði. Báturin skal hava ymisk sýn; hann verður málaður, og haraftrat skulu vit gera fóðurtangar í lastini, sigur bedingsmeistarin.

Nordic hevur staðið á bedingini hjá Tórshavnar Skipasmiðju síðan miðjan januar.

### Nýbygging

Kristoffur Lützen veit at siga, at nógv virksemi er í byggihøllini í løtuni, har nýbygningur av sama slagi, sum Hansa Maria og Skálafossur, verður smíðaður.

Hetta eru snøggir trolbátar.

- Skrokkarnir eru smíðaðir í Pólandi fyri Tórshavnar Skipasmiðju, sum annars eigur alt konseptið.

Bedingsmeistarin veit at siga, at nógvir maskinsmiðir eru í gongd í byggihøllini í løtuni, nú nýbygningurin skal verða liðugur 3. mai.

- Einir 8-10 mans arbeiða soleiðis í tveimum vaktum. Haraftrat kemur eitt nú elarbeiði og apeteringsarbeiði, sum Byggiservice tekur sær av.

### Seinkaður

Kristoffur Lützen veit at siga, at skrokkurin til nýbygningin ætlandi skuldi koma úr Pólandi í november í fjør, men kom ikki fyrr enn í februar í ár.

- Hetta ger, at meira trýst er á hesi bygging, enn tað annars hevði verið, um skrokkurin kom til tíðina, leggur hann aftrat.

Bæði Hansa Maria og Skálafossur eru longdir, síðan teir vóru bygdir, men nýbygningurin, sum er til eitt felag í Havn, hevur upprunaligu mátini, sum er longdin, ið Hansa Maria og Skálafossur hava í dag.

Á Tórshavnar Skipasmiðju arbeiði eini 140 fólk tilsamans, tá ið øll eru íroknað..



*Trolbáturin Búgvin og garnaskipið Thor. Í byggihøllini smíða teir nýbygning, sum skal verða liðugur 3. mai*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Havsbrún størst í Norður-Evropa

**Havsbrún í Fuglafirði tók ímóti væl størri ráfiskanøgdum í fjør enn nakað annað virki av sínum slagi í Norður -Evropa**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroyska sildaverksmiðjan, Havsbrún í Fuglafirði, er tann verksmiðjan í Norður-Evropa, sum tók ímóti størstu ráfiskanøgdunum í 2006.

Hetta vísir eitt yvirlit, sum norska fiskivinnublaðið Fiskaren hevur prentað.

Í miðal tók hvør av teimum tilsamans 14 sildaverksmiðjunum í Íslandi 55.752 tons av ráfiski, meðan tær sjey norsku verksmiðjurnar tóku ímóti 90.532 tonsum í miðal.

Av verksmiðjunum í Íslandi, Noregi og Føroyum, liggur Havsbrún ovast yvir innvigaða rávøru.

### Nógv størst

Havsbrún tók nevniliga ímóti 305.000 tonsum í 2006, meðan verksmiðjan í Íslandi, sum tók ímóti størstu nøgdunum, tók ímóti 185.835 tonsum.

Verksmiðan í Noregi, sum keypti mest, keypti tilsamans 134.325 tons av ráfiski í 2006.

Soleiðis lá Havsbrún langt frammanfyri bæði íslendsk og norsk virki.

Í yvirlitinum liggja tvær verksmiðjur í Danmark fremst í ráfiskanøgd, onnur í Skagen við 380.000 tonsum og hin í Esbjerg/ Thyborøn og Hvide Sande við tilsamans 500.000 tonsum.

Í yvirlitinum verður Danmark ikki roknað sum partur av Norður-Evropu, og tí liggur Havsbrún fremst millum hesi lond.